Lýsingartilfar

# Barnaútgerð

VØGGAN



*Tóra Johansen og Anni Nielsen í nýumvælda handlinum. Majken Johannesen vantar á myndini*

Myndir: Álvur Haraldsen

# Kvalitetsvørur og góð tænasta

**Vøggan á Hálsi í Havn er ein barnaútgerðarhandil við allari útgerð til tey, sum eiga børn og hevur alt frá bringuklútum til eitt stórt úrval av barnavognum. Handilin er nú víðkaður og hevur størri vøruúrval**

Magnus Gunnarsson

Barnaútgerðarhandilin Vøggan hevur nú fingið betri umstøður, við tað at gólvvíddin er vaksin, og vøruúrvalið er munandi størri. Vit leggja stóran dent á góðsku og góða tænastu, eins og at kundar okkara kenna seg tryggar at keypa frá okkum, sigur Tóra Johansen, sum eigur og rekur Vøgguna.

Vøggan er ein handil við breiðum vøruúrvali av ymiskari barnaútgerð, sum familjan við smáum børnum hevur brúk fyri. Tóra Johansen keypti handilin fyri trimum árum síðan. Vøggan hevur annars 11 ár á baki. Handilin lat upp fyrstu ferð í Runavík í 2000. Tað vóru Anni og Rógvi Nielsen, ið byrjaðu við Vøgguni.

Vøggan flutti til Tórshavn í 2004. Tá var handilin í Køkubúðini, har Iktys heldur til í dag. Eftir stutta tíð í Køkubúðini, fluttu tey handilin niðan á Heykaveg 3 á Hálsi, har hann er í dag.

Handilin hevur stórt úrval av útgerð og tilboðum til teirra, sum eiga smábørn. Eitt nú ein byrjanarpakka til tey sum fyrstu ferð fáa eitt barn. I pakkanum er barnavognur, bilstólur, pusliborð, song, madrassa, baðikar, blæuspann, dýna og koddi.

Umframt barnavognar og koyristólar selur Vøggan eisini bilstólar, leikur, barnakamarsmøblar, baðirúmsmøblar, borðstólar og tilhoyr. Vøggan umboðar nógv ymisk merkir av barnaútgerð sum t.d. Emmaljunga, BRIO, Akta Graco, Baby Trold, Basson, Super Nova, Be Safe og mong onnur. Vit leggja stóran dent á góðsku, góða tænastu og at vegleiða kundan, sigur Tóra Johansen.

Vøggan hevur í mong ár havt gott samstarv við barnaansingarstovnar kring alt landið. Handilin hevur stórt úrval av barnaútgerð, ið ein slíkur stovnur hevur brúk fyri. Eisini gera vit viðlíkahald á vognunum á stovninum. Handilin hevur eisini eina tænastu til teirra, ið fáa familju ella vinir, ið búgva uttanlands, á vitjan, har Vøggan bjóðar góðkendar bilstólar til leigu.

Tá tað snýr seg um børn, hevur trygdin alt at siga. Allar okkara vørur hava staðið royndir, ið eru gjørdar eftir galdandi ES-reglum. Vit átaka okkum alla umvæling av barnavognum og koyristólum, sum eru keyptir frá okkum. Um tað t.d. er ein knappur sum er farin, ella tað er okkurt við hjólunum, syrgja vit fyri, at tað verður umvælt. Handilin liggur val fyri í býnum millum hinar handlarnar á miðstaðarøkinum á Hálsi, og parkeringsviðurskiftini eru sera góð, sigur Tóra Johansen.

maggi@sosialurin.fo






